## Sunday á Sandi

B71 arbeiðir við at styrkja um Formula-hópin, tá flytingarvindeygað letur upp í aðru viku. Hesa vikuna hevur Patrick Sunday Okoro, sum annars hevur verið partur av B36-hópinum, vant á Sandi, og roknað verður við, at talan verður um sáttmála. Hartil vónar felagið eisini, at til ber at knýta ein verjuspælara at hópinum, verður sagt av Sandi.



## Ronaldo vil til Real

Slaturið, um at Ronaldo er ávegis til Real Madrid, fekk enn meira lív í dag, tá stjørnuspælarin sjálvur segði, at hann fegin vil sleppa til spanska stórfelagið. - Eg vil fegin spæla fyri Real Madrid. Men bert um tað passar, at teir vilja rinda mær og felagnum tær upphæddir, sum teir hava nevnt. Tað eri ikki eg, sum geri av, hvat meira hendir, men nú havi eg so sagt mína hugsan um hetta, segði Ronaldo í gjár. Hjá ensku meistarunum hevur Sir Alex Ferguson fleiri ferðir sagt, at Ronaldo ikki er til sølu. Líkamikið hvussu stórt boðið er.

KÍ-SKÁLA

# Báðir partar sakna lyklaspælarar

**Klaksvíkingar skulu gera upp við tølini, sum siga, at tað ofta hilnast illa í landskappingardystum á norðoyastevnu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Á Skála vann Skála higar til einasta Formula-sigurin í ár, tá KÍ vitjaði í øðrum umfari av kappingini. Tað vilja klaksvíkingar ikki síggja eina endurtøku av, nú stevnudystur verður spældur*

Tað hevur ofta hilnast illa hjá KÍ í landskappingardystum á norðoyastevnu. Sunnudagin fáa klaksvíkingar nýtt høvi at gera upp við keðiligu stevnutølini, og samstundis verður møguleiki at siga takk fyri seinast við skálamenn. Tá ið KÍ vitjaði á Skála vann heimaliðið 2-1. Hetta er einasta sigurin, sum skálamenn higartil hava vunnið.

Tað er tepurt við tilfari á Skála, og tí rakar tað ógvuliga meint, tá ið Alexandur Johansen orsaka av vøddaskaða ikki er førur fyri at spæla, og tá ið rumenski miðverjin Valeriu Mieila er leikbannaður. Hann sá gult fyri fimtu ferð, tá ið Skála næststíðsta sunnudag tapti tepurt á heimavølli ímóti EB/Streymi.

Í tí uppgerðini kendu skálamenn seg hava fatur á rætta endanum, men – sum so ofta hjá botnliðum – so høvduteirikki marginalirnar í sínum parti.

At tað er tepurt við fólki, og at skaðar og leikbann gera um seg hevur borið við sær, at ungir spælarar hava fingið møguleikan. Atli Kristiansen, Sjúrður Djurhuus og eisini Jógvan Gregersen hava spælt við í ár, og onkrir teirra fara at vera at síggja á vøllinum í Klaksvík á Norðoyastevnu. Eingin skálamaður var við landsliðnum í Estlandi.

Jákup Mikkelsen er einasti KÍ spælarin, sum hesa vikuna hevur verið í Estlandi. Kristian á Lakjuni, Símun Joensen og Rodrigo hava ikki vant. Rodrigo verður við ímóti Skála. Kristian á Lakjuni verður ikki við, tí hann er skaddur. Símun Joensen verður ikki við. Hann er skaðaplágaður og hevur gjørt av at gevast at spæla – fyribils í hvussu so er.

Hóskvøldið vandi Bjarni Jørgensen fyri fyrstu ferð í langa tíð saman við hinum KÍ spælarunum.

B36-Víkingur:

### Víkingur kann hanga eftir

**Skal Víkingur stríðast við um heiðursmerki í ár, verður helst neyðugt við trimum stigum, tá teir vitja hjá B36**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í B36 hevur kósin higar til verið rættiliga bein í royndunum at hanga í teimum báðum ovastu liðunum á stigatalvuni.

Og dysturin sunnudagin er í so máta eitt sera gott høvi til veruliga at staðfesta støðuna. Víkingur er nevnliga á fjórða plássi í Formula-deildini, og tí kunnu teir mest sum krøkjast av, um B36 vinnur sær trý stig sunnudagin.

Tað verður tó uttan fleiri av vanliga føstu spælarunum, at B36 skal royna seg. Liðskiparin, Klæmint Matras, er rættiliga ivasamur, og tað sama er Magnus Olsen. Hartil er Róaldur Jacobsen úti við knæskaða, og tað verður fyri vist roknað við, at hann ikki er tøkur.

Og her spælir tað helst eisini inn, at B36 hevur eina steypafinalu fyri framman. Í øllum førum vilja teir neyvan satsa alt upp á at fáa ein spælara tøkan, soleiðis at úrslitið kanska verður ein enn drúgvari skaði.

Hjá gestunum úr Víkingi er støðan nakað væl frægari í so máta. Símun Louis Jacobsen og Kaj Ennigarð hava drigist við smáskaða, men teir eru helst tøkir. Og tað sama er Hans Jørgen Djurhuus, sum seinasta vikuskifti sat leikbann av sær.

# Framvegis tvey stig á muni

**Bæði Fremad Amager og Roskilde vunnu sínar 3-0 í gjárkvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið hevur umfar í 2. deild eystur í Danmark verið á skránni. Fremad Amager var á Eysturbrúgv, har tað tók sína tíð at fáa bilbukt við Skjold. Í hálvleikinum var tað framvegis málleyst, men í 2. hálvleiki skoraði Fremad Amager tríggjar ferðir. Seinastu ferðirnar hevur Rókur Jespersen verið ímillum teir fyrstu ellivu hjá Fremad Amager. Í kvøld vóru hann og eykamálverjin Hans Jørgensen í Fremad Amager ferðalagnum inn á Eysturbrúgv.

3-0 var eisini úrslitið, tá ið oddaliðið í deildini, Roskilde, hevði vitjan av B93, sum eisini er eitt av fótbóltfeløgunum á Eysturbrúgv.

Úrslitini í kvøld bera við sær, at Roskilde framvegis er á fremsta plássi og harvið á plássinum, sum ber beinleiðis uppflyting við sær. Fremad Amager er tvey stig aftanfyri og harvið á plássinum, sum ber kvalifikatiónsdystir um pláss í 1. deild við sær.

Nú tað resta tvey umfør hevur FC Roskilde 62 stig, og Fremad Amager hevur 60 stig.